# ítróttur

Nr. 112 • mikudagur • 18. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jón Rói aftan fyri beinkin



- *Vit møta allir 23 upp, vit eru allir í umklæðingarrúminum, og vit eru allir við til taktikk fundin. Men tá ið dysturin verður bríkslaður at byrja fara nakrir okkara á áskoðaraplássini, sum eru aftanfyri beinkin, har venjararnir og eykamenninir sita. Har var eg sunnudagin, og har rokni eg heilt víst við, at eg eisini fari at vera í kvøld, sigur Jón Rói Jacobsen undan stórdystinum*

**Miðverjin á landsliðnum bíðar í tolni, inntil hann fyrr ella seinni fer at fáa møguleikan í fremstu røð**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tá ið teir gulu og bláu úr Brøndby í kvøld fara at renna inn á heimavøllin og kanska knappar tveir tímar seinni fara at standa sum meistarar, verður eingin føroyingur í teirra parti. Tað er ikki heilt rætt, at eingin føroyingur verður í teirra parti. Men føroyingurin, sum er í teirra parti, verður heilt víst ikki á vøllinum:

– Vit eru 23 spælarar í 1. liðs hópinum. Vit venja saman hvønn dag. Fyrrapartin mánadagin vandu vit, sum ikki vóru við í framúr sigrinum á OB, eitt sindur meiri, enn teir, sum høvdu vunnið á OB. Men vit venja saman, og vit fingu allir burturav lagkøkuni, sum Michael Laudrup bjóðaði. Hann hevði 39 ára føðingardag sunnudagin.

Tað er Jón Rói Jacobsen, sum framvegis er í Brøndby, sum vit hava á tráðnum.

Ert tú vísur í, at tú ikki verður millum teir fyrstu sekstan í kvøld?

– Um eg fái boð, so verður okkurt øðrvísi, enn tað hevur verið tær seinastu ferðirnar. Vit møta allir 23 upp, vit eru allir í umklæðingarrúminum, og vit eru allir við til taktikk fundin. Men tá ið dysturin verður bríkslaður at byrja fara nakrir okkara á áskoðaraplássini, sum eru aftanfyri beinkin, har venjararnir og eykamenninir sita. Har var eg sunnudagin, og har rokni eg heilt víst við, at eg eisini fari at vera í kvøld.

Ert tú ikki harmur um, at tú ikki verður á vøllinum, um tað eydnast Brøndby at vinna DM í kvøld?

– Eg havi einki at harmast um. Higartil hevur tað gingið so væl, sum tað kundir roknast við. Eg eri tætt at liðnum, men tað hevur ikki verið brúk fyri øðrum enn teimum fyrstu, tí vit hava ikki havt leikbann, og eingin hevur verið skaddur.

Metir tú teg at vera fyrsta eykamannin í miðverjuni?

– Eg veit tað ikki rættuliga. Eg rokni við, at Morten Wieghorst, sum var leikbannaður sunnudagin, og sum oftast er á miðvøllinum, kann setast aftur í miðverjuna, um venjarin heldur, at tað er neyðugt. Men eg veit ikki, um eg verði roknaður sum tann fyrstu aftaná hann. Per Nielsen var dagsins maður ímóti OB, og Dan Anton Johansen hevur eisini verið sera tryggur, staðfestir Jón Rói Jacobsen.

Seinni í vikuni fer hann at fáa boð um, um Michael Laudrup og Brøndby eru sinnað at leingja samstarvið við hann ella ikki.

– Eg havi onga fatan av, hvat teir ætla. Men tað er greitt, at eg fari ikki at flyta aftur til Føroya beinanvegin. Nú skal tað standa sína roynd, hvussu langt tað ber til at koma sum fótbóltsspælari.



*Todi Jónsson verður ivaleyst millum teir fyrstu ellivu í avgerandi dystinum móti brøndby mikukvøldið*

# Todi verður millum teir fyrstu ellivu

**Í FCK royna teir at fyrireika seg til stórdystin í kvøld á sama hátt, sum teir gera til allar aðrar landskappingardystir**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað stendur nógv upp á spæl hjá Toda Jónsson og FCK í kvøld. Um teir ikki vinna í Brøndby, so er møguleikin at vinna DM, sum í vetur var heilt upplagdur, ivaleyst burtur.

Sunnudagin var Brøndby sera sannførandi á heimavølli ímóti OB. FCK var leikliga heilt væl fyri í Esbjerg, men teir megnaðu ikki at gera mál.

– Tað er ein eitt sindur undarlig kensla. Vit spældu framúr væl, men sjálvandi iðra vit okkum um, at tað ikki eydnaðist at fáa mál, sigur Todi Jónsson, sum ivaleyst verður millum teir fyrstu ellivu hvítklæddu í Brøndby í kvøld:

– Eg havi einki hoyrt um liðið, men eg rokni við og vóni, at tað verður pláss fyri mær, og at vit kunnu skora málini, sum vit ikki megnaðu at gera í Esbjerg.

## Fyrireikingin

Ofta hoyrist um serligar fyrireikingar, tá ið nógv stendur upp á spæl. Men FCK spælararnir fara hvørki á gistingarhús ella at venja fyrrapartin, nú teir í kvøld skulu spæla finalu í Brøndby.

– Okkum dámar øllum best, at gerandisdagurin er so vanligur, sum tað ber til. Vit hittast í venjingarhølunum hjá okkum sjálvum einar tríggjar ella fýra tímar undan dystarbyrjan. So fáa vit ein lættan bita at eta, áðrenn vit hava stuttan taktikkfund, og so koyra vit í felag út í Brøndby.

Plágar tað teg nógv, at tað í bløðunum aftur og aftur hevur verið tikið upp í saman í hesi vikuni, at tú misnýtti nógvar møguleikar í Esbjerg?

– Eg havi hoyrt, at eg í onkrum av bløðunum fekk eitt fimm tal fyri avrikið í Esbjerg. Eg veit við meg sjálvan, hvussu avrikið var, og eingin nýtist at siga mær, at eg skuldi havt skorað. Men eg taki mær ikki so nógv av, hvat tíðindamenninir siga. Í níggju av tíggju førum hava teir, sum skriva, ikki spælt fótbólt, og tað kennist beinanvegin aftur í innlitinum ella tvørrandi innlitinum.

Hvat roknar tú við í kvøld?

– Eg vóni, at vit fara at fáa øll stigini og harvið varðveita møguleikan sjálvir at gera av, um vit skulu vinna DM ella ikki. Men tað verður sera torført. Brøndby er á aldukambinum í løtuni, staðfestir Todi Jónsson, sum ivaleyst verður í FCK álopinum saman við Zuma.



# Norðoyastevnan skal fáast upp á pláss




*Á norðoyastevnu verða bátarnir lagdir í tilvildarliga startrøð, og hetta viðførir ofta, at munurin á fremstu bátunum verður í størra lagið, sammett við hinar stevnurnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir fína róðurin á Fjarðastevnuni halda nógv róðrarfólk, at tað á ein ella annan hátt skal syrgjast fyri, at umstøðurnar hjá favorittunum verða meiri eins í fyrstu FM kappingini**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Í trimum kappingum vóru vinnararnir teir somu á nýggju Fjarðastevnuni, sum teir vóru á norðoyastevnu í Klaksvík. Í hinum trimum FM kappingunum vóru nýggir vinnarar. Tað er í sær sjálvum hugaligt, at fleiri eru um boðið at vinna einstøku kappingarnar. Men róðrarfólk og onnur, sum hava fylgt við í teimum báðum FM kapping-unum, sum hava verið higartil, vísa á, at sera misjøvnu úrslitini hjá fleiri manningum í hesum báðum róðrunum heilt víst hava við tað at gera, at umstøðurnar at rógva í Klaksvík vóru so misjavnar hjá teimum, ið lógu undir Kósalandinum, og teimum, sum lógu undir Stoksoyralandinum.

Kristian Eli Zachariasen, sum er formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag, harmast um, at manningarnar, sum hava vant leingi undan FM kappingini í Klaksvík, ikki skulu kappast á jøvnum føti. Eitt nú hava úrslitini hjá Páll Fanga við monnum verið so misjøvn í tveimum teimum fyrstu kappingunum, at tað heilt víst ikki bara hevur við avrikið hjá manningini at gera.

– Norðoyastevnan er tíðliga á sumrinum. Tí er sannlíkið fyri eitt sindur djálvutum sjógvi og vindi væl størri, enn tað er, tá ið tað bara er liðið einar tvær vikur longri út á summarið. Á róðrarøkinum í Klaksvík hevur ættin rættuliga nógv at siga. Bæði í fjør og í ár var hann landsynningur við nógvum vindi. Eingin, sum fylgir við, ivast í, at hetta bæði í fjør og aftur í ár spældi nógv inn á, hvussu bátarnir komu á mál. Teir eystaru komu fyrri inn á slætt, og tað fór skjótari at ganga væl hjá teimum, enn tað gjørdi hjá teimum hinumegin, sum kanska einar hundrað metrar longri enn teir eystaru megin vóru í ósløttum sjógvi.

Skal ikki okkurt gerast fyri at fáa umstøðurnar meiri líkar hjá teimum, sum kappast um fremstu plássini?

– Tað halda vit, sum bjóða til kappróður á norðoyastevnu í hvussu so er. Eg havi eisini ta fatan, at tað eru so mong onnur, sum eru av somu áskoðan. Á heimasíðuni hjá okkum, krf.fo, hava vit havt eina quick poll kanning um hetta, og har góvu umleið tveir triðingar av teimum, sum tóku lut, til kennar, at tey tóku undir við, at okkurt verður gjørt fyri at fáa umstøðurnar hjá favorittunum at vera meiri eins, enn tær nú eru í Klaksvík.

Kristian Eli Zachariassen vísir á tveir møguligar mátar at loysa spurningin, sum róðrarfólk síggja sum ein trupulleika:

– Annar mátin er, at bátarnir á norðoyastevnu verða lagdir út frá, hvussu teir stóðu seg í FM kappingini undanfarna ár ella út frá, hvussu teir stóðu seg á undanfarnu ólavsøkuni. Hin mátin, sum hevur verið nevndur fyri at fáa eina loysn á hesum spurninginum, er, at tað verður skipað fyri undankappingarróðri. Hetta kundi verið gjørt eitt nú á bygdastevnuni, sum plagar at vera á Skála eina ella tvær vikur undan norðoyastevnuni.

Um henda loysnin hevði verið vald, so hevði hon mint um, tá ið teir undan veruligu Formel 1 kappingunum taka tíð fyri at vita, hvussu bilarnir skulu verða plaseraðir, tá ið teir fara undir veruligu kappingina.

Kristian Eli Zachariassen roknar við, at spurningurin um plaseringarnar á norðoyastevnu fer at verða tikin uppaftur á næsta aðalfundinum hjá Róðrarsambandinum.

– Spurningurin varð nevndur, tá ið avgerð skuldi takast um, hvar sjeynda FM kappingin skuldi leggjast. Men tað varð ikki meiri gjørt við hetta. Nú hava kappingarnar her í Klaksvík og á Strondum av álvara mint um, hvussu nógv tað hevur at siga, at umstøðurnar eru so líkar hjá teimum, sum kappast, sum tað ber til. Tí ivist eg ikki í, at spurningurin fer at verða tikin til nýggja viðgerð.

Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum, hevur verið burturstaddur, so tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá honum um henda spurningin. Ivaleyst verður meiri at frætta um hetta seinni.

## Støðan í FM-kappingini

| | 5-mannafør, dreingir | Stig íalt | stig, fjarðast. |
|---|---|---|---|
| 1 | Sílið | 14 | 7 |
| 2 | Havfrúgvin | 9 | 5 |
| 3 | Blikur | 8 | 3 |
| 4 | Tjaldrið | 7 | 4 |
| 5 | Royndin Fríða | 3 | 2 |
| 6 | Fípan Fagra | 3 | 1 |
| | 6-mannafør, kvinnur | | |
| 1 | Gongurólvur | 14 | 7 |
| 2 | Páll Fangi | 10 | 5 |
| 3 | Lómur | 8 | 4 |
| 4 | Smyril | 6 | 3 |
| 5 | Fortuna | 4 | 2 |
| 6 | Fuglfirðingur | 2 | 1 |
| | 5-mannafør, gentur | | |
| 1 | Blikur | 12 | 5 |
| 2 | Sílið | 10 | 7 |
| 3 | Havfrúgvin | 8 | 4 |
| 4 | Drekin | 8 | 3 |
| 5 | Ørnin | 3 | 2 |
| 6 | Firvaldur | 3 | 1 |
| | 6-mannafør, menn | | |
| 1 | Smyril | 12 | 5 |
| 2 | Jarnbardur | 9 | 4 |
| 3 | Páll Fangi | 7 | 7 |
| 4 | Strálan | 7 | 3 |
| 5 | Lómur | 5 | 2 |
| 6 | Sølmundur | 2 | 0 |
| 7 | Sundabáturin | 1 | 1 |
| 8 | Gongurólvur | 1 | 0 |
| | 8-mannafør | | |
| 1 | Ørvur | 14 | 7 |
| 2 | Argjabáturin | 10 | 5 |
| 3 | Kvívíkingur | 8 | 4 |
| 4 | Knørrur | 6 | 3 |
| 5 | Teistin | 4 | 2 |
| 6 | Toftabáturin | 2 | 1 |
| | 10-mannafør | | |
| 1 | Eysturoyingur | 12 | 7 |
| 2 | Havnarbáturin | 11 | 4 |
| 3 | Nólsoyingurin | 9 | 5 |
| 4 | Vestmenningur | 6 | 3 |